Búskapur og vinna:

## Bjarga Fosen

Norsku stjórnarflokkarnir og Arbeiðaraflokkurin hava gjørt av at bjarga skipasmiðjuni Fosen Mekaniske Verksted. Skipasmiðjan var komin í álvarssamar trupulleikar, eftir at hon hevði bygt luksusskipið »The World«, sum gjørdist væl dýrari enn ætlað.

Sambært einari kanning hjá myndugleikunum hevur Fosen Mekaniske Verksted fingið ov nógvan almennan stuðul útgoldnan, men nú sleppur skipasmiðjan frá at gjalda ríkinum munin aftur. Varð tað ikki gjørt, hevði skipasmiðjan farið av knóranum, verður sagt úr Noregi.

## Fiskavirki á húsagang

Fiskivinnufyritøkan Aarsæther í Vardø er farin á húsagang. Tað ber í sær, at 149 fólk eru vorðin arbeiðsleys.

Fyritøkan, sum er meiri enn 80 ára gomul, fór í gjaldssteðg fyrr í hesum mánaðinum, eftir at raksturin av einum fiskavirki, sum varð latið upp í fjør, hevur givið stórt hall. Nýggja virkið, sum er sera nútímans, kostaði næstan 100 milliónir krónur at byggja.

## Nógvir millióningar

Altsamt fleiri danir gerast múgvandi fólk, og sambært einari uppgerð eru tað nú meiri enn 35.000 danir, sum eiga tað, sum svarar til meiri enn eina millión dollarar. Tá er møgulig fastogn ikki tald við, men einans partabrøv, virðisbrøv, innistandandi pengar, gull o.a.

Tað veruliga talið á múgvandi dønum er kortini heldur størri, tí ein sannroynd er tað, at nógvir múgvandi danir velja at búgva aðrastaðni enn í Danmark.

Samstundis vísir ein altjóða uppgerð, at 7,1 milliónur fólk kring heimin eiga meiri enn eina millión dollarar.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Hægstirættur í USA avmarkar deyðarevsing



*Bygningurin hjá amerikanska hægstarætti í Washington*

**Drápsmenn, sum eru menningartarnaðir, kunnu ikki longur dømast til deyða.**

DEYÐAREVSING
*Árni Joensen*

Fyri fyrstu ferð síðani deyðarevsing varð sett í gildi aftur í USA í 1976, hevur amerikanski hægstirættur avmarkað møguleikarnar hjá myndugleikunum at tøma fólk til deyða. Tað hendi hósdagin, tá ein meiriluti av dómarunum í hægstarætti samtykti at broyta verandi mannagongd.

Seks av teimum níggju dómarunum tóku undir við úrskurðinum, sum sigur, at tað er skeivt og í stríð við grundlógina at nýta deyðarevsing ímóti fólki, sum ikki eru menningarliga búgvin.

Hesin sami spurningurin var fyri í hægstarætti fyri trettan árum síðani, men ta ferðina kom rætturin til ta beint øvugtu niðurstøðuna. Hesi trettan árini er tað hent, at 18 av teimum 38 statunum, sum loyva deyðarevsing, hava sjálvir gjørt av, at menningartarnaðir drápsmenn kunuu ikki fáa deyðarevsing. Teir seks hægstarættardómararnir siga tí í úrskurðinum, at tað má haldast at vera fólksins vilji, at verandi mannagongd eigur at verða broytt.

Teir tríggir dómararnir, sum sýttu fyri at taka undir við úrskurðinum, funnust hvassliga at sínum starvsfeløgum. Teir halda, at teir seks hava í alt ov stóran mun latið seg ávirkað av teimum, sum eru ímóti deyðarevsing.

Formaðurin í hægstarætti, William Rehnquist, sum var ímóti at broyta verandi skipan, var í øðini inn á hinar seks. Men ein talsmaður hjá teimum seks segði, at áskoðanin hjá meirilutanum í hægstarætti er uttan iva í samsvari við tað, sum meirilutin av amerikanska fólknum heldur um málið.

Úrskurðurin fer at fáa týdning fyri fleiri fangar, sum sita á deyðagongini í amerikanskum fongslum.

# Ávara ímóti evropeiska skansanum

**Altjóða stovnar, felagsskapir og serfrøðingar ávara ímóti ætlanini hjá ES at girða seg inni fyri at halda flóttafólkum og innflytarum burturi.**

Eitt av teimum stóru málunum á ES-toppfundinum, sum byrjaði í spanska býnum Sevilla í gjár, er at fáa eina felags semju um, hvussu londini í samveldinum skulu avmarka møguleikarnar hjá fremmandafólki at koma um inn í samveldið.

ES leggur dent á, at endamálið er at steðga teimum nógvu ólógligu innflytarunum, sum serliga koma úr Norðurafriku og Miðeystri, og flestu ES-londini hava mælt til at seta búskaparlig tiltøk í verk ímóti londum, sum sýta fyri at taka ímóti teimum, sum ES sendir heimaftur. Semja er tó ikki um tann politikkin, og serliga Frakland og Svøríki hava hug at fara meiri hóvliga fram.

Fleiri altjóða stovnar, felagsskapir og serfrøðingar ávara nú ES ímóti at byrgja seg inni. Teir bera ótta fyri, at ein møgulig avmarkingarskipan fer eisini at raka tey, sum veruliga eru flóttafólk, og sum tískil hava rættindi sum slík. Millum teirra, sum ávara, eru flóttafólkastovnurin hjá ST, Evropeiska Flóttafólkaráðið, Amnesty International og fleiri aðrir mannarættindafelagsskapir.

Í einari áheitan, sum Amnesty International sendi stjórnarleiðarunum í ES-londunum mikudagin, varð sagt, at ætlanin hjá ES at girða seg inni fer bert at økja flóttafólkastreymin. Felagsskapurin vil vera við, at hugskotið um at halda teimum fremmandu uttanfyri samveldið er eitt úrslit av teirri høgrabylgjuni, sum hevur gjørt um seg í fleiri av ES-londunum í seinastuni.

-Sjálvt tað mest diplomatiska orðalagið kann ikki fjala, at ES hevur ringa samvitsku og bert hugsar um egin áhugamál, stóð m. a. í áheitanini frá Amnesty International.

Frakland og Svøríki hava skotið upp, at ES skal økja búskaparliga stuðulin til tey londini, sum teir ólógligu innflytaarnir rýma úr, tí á tann hátt ber til at fáa fólk at støðast í heimlandinum, halda stjórnirnar í París og Stockholm.

Hesum tekur flóttafólkastovnurin hjá ST undir við. Talsmaðurin hjá UNHCR, Kris Janowski, segði í gjár, at tey ríku londini eiga at hjálpa teimum fátæku londunum, sum fólk har verða verandi í heimlandinum.

Úr Norðurlondum:

## Pápin fongslaður

Rætturin í Vordingborg í Danmark gjørdi hósdagin av at varðhaldsfongsla ein 34 ára gamlan mann av irakskum uppruna, eftir at løgreglan hevði ákært hann fyri at hava dripið sína egnu 14 ára gomlu dóttur í januar í ár. Maðurin noktar seg sekan. Tað gjørdi hann eisini, tá løgreglan avhoyrdi hann, eftir at dótturin varð funnin deyð í havnini í Præstø í januar. Men løgreglan sigur seg hava funnið nýtt tilfar í málinum, og tað helt rætturin vera grundarlag fyri at varðhaldsfongsla mannin.

## Kendur skipari heiðraður

Skiparin á norska farmaskipinum »Tampa«, Arne Rinnan, varð hósdagin heiðraður við Nansen-heiðursløníni. Nansen-virðislønin verður latið fólki, sum á serstakan hátt hava hjálpt flóttafólki, og Arne Rinnan fekk virðislønina, fyri at hann við skipi sínum »Tampa« bjargaði 438 fóttafólkum av einum søkkandi skipi í Indiska Havinum í fjør.

Virðislønin er 750.000 krónur, og tað var dóttir Arne Rinnan, sum tók ímóti henni. Arne Rinnan er sjálvur við »Tampa«. Í august kemur skipið til Gøteborg, og tá mynstrar hann av. Hetta er seinasti túrur hansara, tí í august verður hann pensjoneraður.

## Ráðharrasonur tikin

Danska løgreglan tók mikudagin son Bendt Bendtsen, búskaparmálaráðharra, eftir at løgreglan hevði funnið amfetamin í íbúð hansara í Odense. Hósdagin varð tann 22 ára gamli maðurin í grundlógaravhoyring fongslaður í fýra vikur.

Bendt Bendtsen boðaði sjálvur almenninginum frá, at sonur hansara varð vorðin handtikin. Ráðharrin, sum sjálvur er fyrrverandi løgreglumaður, hevur gjørt av at halda frí frá politikki ta næstu vikuna. Tað verður ikki hildið, at málið fær nakrar politiskar avleiðingar fyri ráðharran.



# Tekniskir studentar fingið prógv

**Í góðveðrinum fríggjamorgunin fór prógvhandanin hjá Tekniska skúla í Klaksvík fram. Frítíðarplássið úti í Grøv var karmur um hugnaløtuna, og eydnaðist hon avbera væl**



*Her eru næmingarnir avmyndaðir á nýggju brúnni um ánna úti í Grøv, sum tey sjálvi hava gjørt*

PRÓGVHANDAN
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Níggju næmingar kunnu nú kalla seg tekniskir studentar. Fýra dreingir og fimm gentur fingu HT prógvini handað í Klaksvík fríggjamorgunin. Heilt fitt av fólki var savnað til hesa hugnaløtu, sum eydnaðist avbera væl, kanska serliga tí, at veðurgudarnir vóru við teimum hesa løtuna. Tað var lýtt og sólin hevði hug at koma fram.

Tummas Pauli Mýri, búskaparfrøðingur, helt gestarøðuna, og hann samanbar framtíðina hjá hesum ungu fólkum við eitt stórt sjálvtøkuborð við øllum teimum ymisku møguleikunum fyri víðari lesnaði, sum nú liggja fyri framman.



*Pauli Mýri var gestarøðari undir prógvhandanini*

Limir úr Klaksvíkar Hornorkestri settu eisini sín dám á løtuna við vøkrum fosturlandssangum.

Eftir gestarøðuna handaði skúlastjórin, Rúni Heinesen prógvini. Fyrst fingu tey, sum hava gingið eitt ár prógv. Eitt ára skeiðið eitur SIT. Síðani fingu tey, sum hava lisið í tvey ár og at enda HT – ararnir.

Tað, sum er merkisvert við hesum árganginum er, at tað eru fleiri gentur enn dreingir.

– Tað er ongantíð komið fyri áður, segði Gunhild Dahl Niclassen, umboð fyri næmingarnar í røðu síni í góðveðrinum.

Hon legði eisini skemtandi afturat, at tað ongantíð hevði verið trupult hjá gentunum at fáa sín vilja í flokkinum, tí meirilutin ræður.

Eisini kom hon inn á komandi undirsjóvartunnilin um Leirvíksfjørð. Hon helt, at hann so avgjørt kann fara at hava við sær, at alt fleiri ung fara at velja at koma til Klaksvíkar at ganga í skúla. Í tí sambandinum heitti hon á avvarðandi myndugleikar um at fáa eitt samstarv av onkrum slagi í lag, sum kann hava við sær, at skúlagongdin í Klaksvík kann fara at gerast alt meiri breiðari.

Hon endaði røðu sína við, vegna næmingarnar, at takka lærarunum og leiðsluni fyri tíðina á skúlanum og allan lærdómin.

Síðani varð farið at taka myndir á tí nýggju brúnni yvir um ánna, sum næmingarnir sjálvir hava gjørt.

Síðani varð farið heim í Tekniska skúla til ein kaffimunn.



*Gunhild Dahl Niclassen helt pisurøðuna hjá HT – arunum*

# Samstarvsavtala millum Kirkjubø og Havnina

**Tórshavnar Kommuna og Kirkjubøar Kommuna hava gjørt samstarvsavtalur, sum loyvir Kirkjubøar Kommunu at nýta tænasturnar hjá høvuðsstaðnum fyri eitt gjald**

KOMMUNUR
*Heri á Rógvi*



*Samstarva um mørk: Annfinn Brekkstein og Jan Christiansen heilsa nýggja samstarvinum á markinum millum Kirkjubøar- og Tórshavnar Kommunu*

*Mynd: Finnur Justinussen.*

Tórshavnar Kommuna og Kirkjubøar Kommuna hava gjørt eina samstarsavtalu. Grannakommunurnar í Suðurstreymoy eru komnar ásamt um eina samstarvsavtalu.

– Avtalan er ein formalisering av verandi samstarv og víðkan av verandi samstarvi, sigur Annfinn Brekkstein, borgarstjóri í Kirkjubøar Kommunu.

Kommunurnar báðar hava í longri tíð samstarva innan nógv øki, eitt nú skúlar og barnagarðar. Talan hevur verið eitt gott samstarv, sum báðir partar hava verið nøgdir við.

Samstarvið virkar á tann hátt, kommunurnar gjalda eitt gjald fyri at nýta skúlaella ansingarpláss hjá hvørjum øðrum.

– Við hesum sáttmálum kunnu borgarar í Kirkjubøar Kommunu nýta tænastu í Tórshavnar Kommunu á jøvnum føti við allar havnarborgarar, siga teir báðir borgarstjórarnir, Annfinn Brekkstein og Jan Christiansen.

Fyribils skal Kirkjubøar Kommuna, sum hýsir bæði Velbastað og Kirkjubø, gjalda eitt árligt gjald áljóðandi 25.000 kr. fyri mentanartiltøk, og so verður alt annað roknað fyri seg.

– Vit kunnu við hesum gera okkum dælt av teirra servitan á nógvum økjum, og hetta er ein góð avtala fyri okkum, sigur Annfinn Brekkstein.

Eisini Jan Christiansen letur væl at.

### Samanlegging

Nýggja samstarvsavtalan er í tráð við orðaða politikkin í Kommunuálitinum.

Báðir borgarstjórarnir eru eisini sinnaðir fyri einari møguligar samanlegging í framtíðini.

Jan Christiansen heldur tað vera natúrligt, um kommunurnar einaferð í framtíðini leggja saman, tí teir liggja so tætt hvørjari aðrari.

Annfinn Brekkstein heldur, at vísir hetta samstarvið seg at rigga væl, so kundi tað verið ein góður møguleiki fyri einari samanlegging í framtíðini.